# Claus vann í Southampton

Claus Bech Jørgensen spældi við allar 90 minuttirnar, tá Blackpool spældi í næstbestu ensku fótbóltsdeildini um vikuskiftið. Blackpool var á vitjan har suðuri hjá Southampton, og teir høvdu øll trý stigini við sær norður aftur. Einasta málið í dystinum skoraði Burgess við brotssparki beint fyri hálvleiksssteðgin. Sløk 16.000 fólk hugdu eftir dystinum, har Blackpool fekk fyrsta sigurin í hesum kappingarárinum.



# Gilli søkti Celtic

U17 liðið hjá Aberdeen spældi um vikuskiftið ímóti Celtic, og teir úr Aberdeen vunnu heili 4-1. Tveir føroyskir spælarar hava júst gjørt sáttmála við Aberdeen, og annar av teimum, Gilli Sørensen, skoraði tvey mál í hesum dystinum. Hin føroyski spælarin í Aberdeen er Hallur Hansson. Bæði Hallur og Gilli eru á føroyska U17 landsliðnum í fótbólti, sum í næstum skal til EM-undankapping í Portugal.

Víkingur.B36 1-2 (1-2):

# Málmurin fór úr Sarpugerði

**B36 leitaði eftir sær sjálvum, áðrenn tað eydnaðist at vinna ógvuliga týdningarmikla uppgerð á útivølli í Eysturoy**



*Triðju ferð eydnaðist tað hjá B36, sum undan vitjanini í Sarpugerði hevði tapt tveir dystir á rað í Eysturoynni*

*savnsmynd*

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

*Víkingur*

*B36*

Alle gode gange tre, plagar at verða tikið til. Fyri triðju ferð í eina viku var B36 í gjár á vitjan í Eysturoy. Næstsíðsta sunnudag tapti árstalsfelagið á Toftum, og mikukvøldið tapti B36 í Fuglafirði.

Í gjár var setningurin at fáa stig við til hús úr Gøtu, og tað eydnaðist. Ivaleyst høvdu teir í B36 undan fráferðini úr Gundadali ikki verið heilt misnøgdir, um úrtøkan hevði verið eitt stig.

Høvuðsstaðarliðið miðjaði høgt í Sarpugerði, og tað eydnaðist at vinna fulla úrtøku, og tað er ikki at undrast á, at gestirnir fóru ovurfegnir til hús:

- Hetta var akkurát tað, sum okkum tørvaði. Vit vóru sera misnøgdir við avrikið og úrslitið, tá ið vit mikukvøldið vóru í Fuglafirði og taptu 1-0. Hesa ferð vístu vit fínan hugburð, og tað bar úrslit við sær, sum ger, at vit sjálvir kunnu gera av, um vit skulu vinna silvurkrónurnar, staðfesti Magnus Olsen hjá B36, tá ið Eiler Rasmussen, sum greiddi torføra setningin væl, hevði bríkslað fyri síðstu ferð.

Heðin Askham var ikki heilt nøgdur við uppstillingina, sum hann legði fyri við, og í 1. hálvleiki rokeraðu gestirnir í Gøtu eitt sindur. Magnus Olsen, sum fyrstu løtuna var vongverji í høgru, varð fluttur á sentrala miðvøllin. Dimitrij Jankovic hevði fyrstu løtuna sentralan miðvallarleiklut, men tað hilnaðist einki serligt, og so varð hann fluttur í miðverjuna, har hann man vera ein tann stinnasti í landinum. Herbert í Lon Jacobsen var fyrstu løtuna í miðverjuni, men so varð hann fluttur á høgra vongverja.

Meðan B36 leitaði eftir optimalu uppstillingini fyri at fáa bilbukt við víkingarnar, sum sær sjálvum líkir stríddust sum fyri lívinum, skoraðu teir tvey mál, og heimaliðið skoraði eitt.

Sekundvísarin hevði bara verið hálva aðru ferð runt, tá ið bólturin lá í meskunum aftanfyri Geza Turi. Miðvallarin Róaldur Jacobsen legði neyva frísparkssending úr vinstru og í brotsteigin, har Hanus Thorleifsson var nóg leysur til at seta krúllin undir bóltin, og so var fagnaður millum B36 spælararnar og viðhaldsfólkini, sum í viðførinum høvdu so vánalig minni frá fesku vitjanunum í Eysturoy.

Og tað var um reppið, at Hanus Thorleifsson lítla løtu seinni økti um leiðsluna, men Víkingur gav hornaspark í høgru.

Tá vóru níggju minuttir farnir, og í næsta álopinum javnaði heimaliðið. Miðvallarin Sølvi Vatnhamar varð feldur í brotsteiginum, og ein annar miðvallari, Sam Jacobsen, var púra tryggur, tá ið hann sendi brotssparkið í málið aftanfyri Meinhard Joensen.

Tað var futtur í og gott undirhald í 1. hálvleiki. Málið, sum vísti seg at verða avgerandi, skoraði Jákup á Borg, tá ið hálvur tími var farin. Alex dos Santos sendi frágera góða diagonala sending til landsliðsspælaran, sum tamdi væl, áðrenn hann snaraði um seg sjálvan og við vinstra beinið legði bóltin yvir í handara síðunetið.

Eftir steðgin dovnaði spælið. B36 var tilvitað um, at nú var tað heimaliðið, sum skuldi standa fyri undirhaldinum. Tá ið gestirnir fingu fatur á bóltinum, var setningurin at varðveita hann, meðan bíðað var eftir møguleikum fyri álopum. Álopsbroddurin er einki serligur, og síðstu løtuna var tað heimaliðið, sum royndi at leggja trýst á fyri at koma afturíaftur.

Símun Louis Jacobsen hevði góða roynd beinanvegin eftir steðgin, og Andreas Lava Olsen var støðug hóttan, men tað eydnaðist ongantíð at fáa bóltin í B36 málið, og harvið er árstalsfelagið væl meiri við í kappingini um krónurnar, enn víkingarnir eru tað.

## Hetta var ikki nóg gott

Eftir at tað leingi hevur gingið sum eftir ánni hjá Víkingi, hevur tað tvær tær seinastu ferðirnar verið sera soltið. Mikukvøldið taptu víkingar 1-0 á heimavølli ímóti B68, og í gjár taptu teir 2-1 ímóti B36.

- Vit hava dúvað upp á liðandan, men hann hevur ikki verið nóg góður tvær tær seinastu ferðirnar. Vit hava havt samskiftistrupulleikar í verjuni, og tað hevur kostað bílig mál, staðfesti miðverjin og liðformaðurin, Niclas Niclasen, tá ið stríðið var lokið.

Víkingarnir siga seg framvegis rokna við, at tað skal eydnast at vinna heiðursmerkir:

- Vit eiga bæði NSÍ og HB á heimavølli. Tað er upp til okkum sjálvar at syrgja fyri betri úrslitum, enn vit hava megnað tvær tær seinastu ferðirnar. Um tað eydnast, so verða vit aftur á heiðursmerkjaplássi.

**-mørk**

## Triði sigurin á útivølli

B36 hevur staðið seg væl á heimavølli, og B36 hevur staðið seg minni væl á útivølli. Tað vísa úrslitini. Á heimavølli hava teir vunnið sjey ferðir, fýra ferðir hevur verið javnt, og enn hevur B36 ikki tapt í Gundadali.

Ellivu stig eru frá fjórða plássinum hjá B36 og fram til toppplássið hjá EB/Streymi. Munurin hevði havt verið væl minni, um tað hevði havt eydnast B36 at vinna størri úrtøku á útivølli, enn teir higartil hava gjørt. Tíggu ferðir hevur B36 spælt á útivølli (eina ferð ímóti HB), og sigurin í gjár ímóti Víkingi var bara triðja ferðin, at tað hevur eydnast at vunnið á útivølli. Hinir sigrarnir hava verið á Sandi og á Toftum.

Í seks teimum síðstu umførunum skal B36 spæla tríggjar ferðir á útivølli: í Gundadali ímóti HB, í Streymnesi og í Runavík. Tvær ferðir hevur B36 tapt í Klaksvík. Annan sunnudag fara klaksvíkingar at vitja í Gundadali.

**-mørk**